tylgiskjal 1.

LM-069/2022

LØGTINGIÐ

Málráðið
malrad@malrad.fo

Løgtingsformaðurin

1. februar 2023
j. nr.
(at tilskila í svari)

Viðvíkjandi starvsheitum Løgtingsins
Løgtingið hevur í umbúna at viðgera og broyta heitini løgtingsmaður, landsstýrismaður v.m., sum eru ásett í Stýrisskipanarlógini og Tingskipanini, soleiðis at hesi í størri mun fevna um bæði kvinnur og menn. Í hesum sambandi loyvi eg mær at venda mær til tykkara at spyrja um ráð, hvørji heiti eftir tykkara tykki eru best egnað at velja, hvørji eiga at verða broytt, og hvørji møguliga ikki eiga at verða broytt.

Spurningurin er áður umrøddur í løgtingsmáli 62/2019, sum ikki bleiv samtykt tá, men formansskapurin í Løgtinginum hevur nú tikið málið upp við tí fyri eyga at fáa hetta lagt aftur fyri tingið.

Tey heitini, sum eru í umbúna at umrøða og broyta, eru hesi:

- Løgtingsmaður; áður er umrøtt, hvørt hetta skal broytast til løgtingsmaður/-kvinna, løgtingslimur ella løgtingsfólk.
- Landsstýrismaður; áður er umrøtt, hvørt hetta skal broytast til landsstýrismaður/-kvinna ella landsstýrisfólk.
- Løgtingsformaður; áður er umrøtt, hvørt hetta skal broytast til løgtingsformaður/-forkvinna ella annað felagsheiti, t.d. løgtingsforseti, sum kann fevna um bæði kynini, uttan mun til, hvør situr í embætinum.
- Løgmaður; áður er umrøtt, hvørt hetta skal broytast til løgmaður/løgkvinna ella annað felagsheiti, sum kann fevna um bæði kynini, uttan mun til, hvør situr í embætinum. Í 2019 var av summum málkønum ført fram, at munur var á ymsu heitunum, og ivamál var um, hvørt heitið løgmaður ikki í størri mun snúði seg um søguliga embætið heldur enn um persónin, sum sat í embætinum.

Onnur heiti, sum støða eisini skal takast til, tá farið verður í holt við hetta, eru:

- Formansskapur í Løgtinginum, sum fevnir um løgtingsformann og tríggjar næstformenn.
- Floksformaður.
- Aldursformaður, sum er elsta fólk á tingi á aldri.
- Nevndarformaður og næstformaður.
- Varamaður, sum er tann, ið tekur sætið á tingi fyri tingmann í farloyvi.
- Varalimur, sum er tann, ið er valdur sum varalimur fyri nevndarlim í tingnevndunum.
- Embætismaður.
- Uttantingsmaður, sum í Stýrisskipanarlógini er nýtt um møguleikan at velja ein persón, sum ikki er løgtingsmaður, til Løgtingsins umboðsmann.

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901

Tað stendur Málráðnum frítt at meta um heitini og koma við møguligum egnum uppskotum um onnur heiti, enn tey, sum eru nevnd omanfyri.

Ætlanin er at leggja málið fyri Løgtingið í vár.

Vinaliga

Bjørt Samuelsen
løgtingsformaður